

## LEIÐANDI LØGFRØÐINGUR:

# Eru *bleytu* paragraffirnar tín **STYRKI**?

### Almanna- og heilsumálaráðið søkir eftir leiðandi løgfrøðingi at seta sum skjótast

Høvuðsuppgávan hjá leiðandi løgfrøðinginum verður at tryggja dygdina innan tað løgfrøðiliga virksemisøkið í Almanna- og heilsumálaráðnum. Leiðandi løgfrøðingurin kemur at hava fjølbroyttar arbeiðsuppgávur innan umsiting av verandi lógarøkjum og løgfrøðiligari menning av nýggjum átøkum innan almanna- og heilsuøkið.

**Uppgávurnar umfata m.a.**

- Geva ráð í løgfrøðiligum spurningum í málsviðgerðini í Almanna- og heilsumálaráðnum
- Vera við til at orða uppskot til lógir, kunngerðir v.m. og tryggja dygdina í hesum
- Vera við til at leggja løgfrøðiliga arbeiðið til rættis í stjórnarráðnum
- Skipa innleiðsluna og upplæring av nýggjum løgfrøðingum í stjórnarráðnum
- Luttaka í verkætlanum og hava løgfrøðiligu ábyrgdina í hesum samanhangi
- Samstarva við onnur við løgfrøðiligari ábyrgd í øðrum stjórnarráðum í miðfyrisitingini.

Tann rætti persónurin til starvið hevur útbúgving sum cand.jur. og hevur fleiri ára starvsroyndir frá løgfrøðiligum arbeiði innan almennu umsitingina. Leiðandi løgfrøðingurin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt á einum høgum fakligum støði, duga væl at samstarva við aðrar fakbólkar og kunna greiða frá um løgfrøðilig evni á ein lætt skiljandi hátt og duga væl at orða seg í skrift og talu.
Leiðandi løgfrøðingurin kemur at vísa beinleiðis til aðalstjóran.

Starvið verður lønt eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya. Starvsøkið fatar um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Almanna- og heilsumálaráðið.

Tann, ið settur verður, má tola broytingar í virkisøkinum og at økið verður umskipað.

**Neyvari upplýsingar**

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á telefon 304050.

**Umsóknir**

Umsóknir við avritum av prógvum, CV og øðrum, skulu sendast til: Almanna- og heilsumálaráðið, Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn. Ella til ahr@ahr.fo

**Umsóknarfreist**

Freist at søkja er 24. apríl 2008, kl. 12.

Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðamál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

- Vit draga eina línu - Vit seta skynsemi í hásæti - Vit vilja vita - Vit bróta slóð

**ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn . Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo

KREA